

# MAÐURIN VAR FULLUR Í LYGN

**STARVSFELAGAR** HANSARA **ØVUNDAÐU** HONUM. **STJÓRAR** HANSARA **VIRÐISMETTU** HANSARA **AVRIK**. ÍDNASTU **ÍTRÓTTARFÓLKINI** OG **HEIMSSTJØRNURNAR** ÚR HOLLYWOOD. **KUMMER** TOSAÐI VIÐ **ØLL** OG KUMMER TOSAÐI VIÐ TEY, UM **TEIRRA** STØRSTU **LOYNDARMÁL** OG ÓKENDU **SÍÐUR**. TEY **FLESTU** ÓTU SØGURNAR **RÁTT**, MEÐAN **NØKUR UNDRAÐUST**. HVUSSU **BAR** TAÐ TIL, AT UNGI **SVEISISKI JOURNALISTURIN** SLAPP SO TÆTT UPP AT TEIMUM **ALLAR STØRSTU?** SVARIÐ **VÍSTI** SEG AT VERA **ÓGVULIGA** EINFALT



**PORTRETT**

**Rólant Waag Dam**
rolant@sosialurin.fo

Tom Kummer hevði nakað, eingin annar journalistur hevði. Hvat tað var, visti eingin og hvussu hann bar seg at, var øllum ógreitt. Men Tom Kummer hevði tað í øllum førum. Tað.

Tað, sum gjørdi, at hann fekk samband við allar størstu stjørnurnar. Mike Tyson. Sean Penn. Pamela Anderson. Charles Bronson. Courtney Love. Kim Bassinger. Listin av heimsstjørnum var langur. Hetta í sjálvum sær, er serstakt. Men tað, sum Tom Kummer hevði fram um allar aðrar journalistar, var, at stjørnurnar tosaðu við hann um alt.

Frá miðskeiðis í nítiárunum fram til 2000, helt ungi journalisturin úr Sveits populeru pressuna í Hollywood fyri gjøldur. Royndir journalistar, gamlir í garði og við einum ovurhondsstórum netverki, stóðu ikki Tom Kummer kurl.




### Tosaði við Tyson um Nietzsche

Kummer tosaði við Mike Tyson. Tað høvdu mangir journalistar gjørt áðrenn hann, men brutali boksarin er ikki tiltikin fyri at flúgva serliga høgt intellektuelt. Tyson plagdi at lata nevarnar tala og tað gjørdi hann best í boksiringinum. Men í samrøðu við Kummer fekk almenningurin heilt aðrar síður at síggja av Tyson. Maðurin hevði djúphugsnar tankar um heimsspekingin Nietzsche. Tyson greiddi somuleiðis frá, hvussu hann át kakkulakkar í geglinum, fyri at tryggja sær nóg mikið av proteinum.

Eisini viðurkendi sjónleikarin og leikstjórin Sean Penn, vísti seg at hava stórt innlit í heimspeki, har hann serliga var hugtikin av danska Søren Kierkegaard. Ein annar sjónleikari, Bruce Willis, gav somuleiðis alternativar hugsanarhættir til kennar. Í samrøðu við Kummer segði hann, at góður moralur ikki førdi nakran veg.

– Tað er við at vera amoralskur og kyniskur, at tú flytir teg frameftir, segði Hollywoodstjørnan við Kummer.

Hesar einastandandi opnu, erligu og vælskrivaðu samrøðurnar vóru nógvar í tali. Í samrøðu við bringuprúðu Baywatch- og Playboydulluna Pamela Andersen, viðgjørdu hon og Kummer torskildu science-fiction skaldsøguna Neuromancer eftir William Gibson. Charles Bronson, sum er tiltikin harður hálsur í Hollywood, fortaldi somuleiðis fyri Kummer, at hann brúkti nógva tíð upp á at dyrka orkideir. Eisini Kim Bassinger, Courtney Love, Sharon Stone, Nicholas Cage og fleiri við teimum tosaðu við Kummer um sex, rúsevnir, einsemi og onnur privat og kensluborin evni.

Fyrstu samrøðurnar, Kummer gjørdi, vórðu prentaðar í týska tíðarritinum Tempo. Seinni gjørdist Kummer Hollywood-korrespondentur fyri viðurkenda Süddeutche Zeitung, men eisini háttvird bløð sum

